ATLANTIC AIRWAYS
HONDBÓLTUR MENN

## FAKTA – KÍF

**Stovnað:**..................... 1942
**Formaður:**................. Jákup Dam
**Venjari:**...................... Kári Mortensen
**FM-heiti:**.................... Einki

## – Eg vóni, at vit kunnu náa medaljurnar

**Ein av útlendsku leikarunum hjá KÍF er Mirko Milinkovic. Hann sigur, at liðið í ár er betri enn tað hevur verið hini árini, hann hevur verið her, men at tað kann gerast ein stórur trupulleiki, at fleiri av leikarunum hjá kollfirðingum ikki byrja at venja, fyrrenn síðst í næsta mánað.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*


*Mirko sigur, at KÍF má uppí oddin, men tað kann gerast ein trupulleiki, at fleiri av leikarunum eru upptiknir av øðrum ítrótti.*

Mirko Milinkovic hevur verið í Føroyum í nøkur ár, og hann er vorðin partur av vanliga bygdalívinum í Kollafirði. Umframt hetta, so er hann ein av týdningarmestu leikarunum á besta manslíði hjá kollfirðingum í hondbólti, og vit hava spurt hann, hvørjar vónir kollfirðingar hava til komandi kappingarár.

### KÍF má upp í oddastríðið

Nú hevur Mirko í nøkur ár verið partur av KÍF liðnum, og flestu av hesum árunum hevur KÍF ligið í botninum. Nú heldur Mirko, at liðið er nóg gott til at blanda seg upp í medaljustríðið. “Vit hava eina góða blanding á liðnum, og nú er tíð uppá, at vit koma longur upp á stigatalvuna. Vit hava eisini fingið nýggjan venjara við nýggjum hugskotum, og hetta vóni eg fer at hjálpa okkum.” Hann ásannar tó, at fleiri av liðunum í ár eru sterk, og at tað kann gerast trupult, men við rætta viljanum, so er hetta ikki ómøguligt.

### Trupulleiki við væntandi spælarum

Síðstu árini hevur fleiri ferðir verið nær við hjá kollfirðingum, men tað vísir seg, at teir ofta mangla tað síðsta. Mirko heldur, at sjálvt um liðið sær spennandi út, so er tað ein trupulleiki, at fleiri av leikarunum ikki byrja at venja fyrrenn síðst í næsta mánað. “Síðstu árini hava vit víst, at vit kunnu klára okkum ímóti øllum liðum, men tað krevur, at allir mans eru tøkir. Í løtuni eru fleiri mans upptiknir av fótbólti, og hetta er ein stórur trupulleiki hjá okkum. Um teir vera klárir til hondbóltin, so hava vit at sera gott lið.”

Hann sigur víðari, at kollfirðingar hava trupulleikar, um teir mangla nógv fólk, tí hópurin er ikki tann størsti í landinum. Tí hava teir brúk fyri øllum spælarunum, fyri at kunna klára seg í kappingini ímóti hinum liðunum í bestu deildini.

### Kári er rætti maðurin

At enda sigur Mirko, at hann er stak glaður fyri nýggja venjaran. “Kári er skilagóður, og hevur stak gott eyga fyri hondbólti. Allir spælararnir hava respekt fyri honum, og tað er sera týdningarmikið í hondbólti.”

Hann endar við at siga, at kollfirðingar til tíðir hava havt ov smáar ambitiónir. Nýggi venjarin, Kári Mortensen, hevur stórar ambitiónir, og tað, heldur Mirko, kann føra liðið síðsta vegin móti oddinum.

# Spennandi lið í nýggjari høll

**Kollfirðingar hava í nógv ár myndað botnin í bestu mansdeildini. Nú hava teir fingið nýggja høll, nýggjan venjara, og spælaratilfeingið tykist vera betri, enn tað nakrantíð hevur verið. Nú er tíðin búgvin, til at KÍF tekur síðsta stigið móti medaljunum.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*


*Kollfirðingar hava í nógv ár ligið í botninum. Nú hava teir fingið nýggjan venjara, og hann vónar, at KÍF kann spæla seg longur upp á stigatalvuni í nýggju høllini.*

Kollfirðingar hava í nógv ár verið partur av bestu mansdeildini í hondbólti, men enn hava teir ikki roynt at standa á ovastu rók. Um tað verður í ár skal vera ósagt, men tað er ein sannroynd, at hópurin hevur sjáldan sæð so sterkur og spennandi út, sum hann ger í ár.

Harafturat hava kollfirðingar fingið egna høll. Hetta ger, at umstøðurnar hjá teimum yngru gerast nógv betri. Nú hava tey møguleika at venja dagliga í Kollafirði og noyðast ikki at fara av bygdini fyri at venja í eini ordiligari høll. So framtíðin tykist góð, samstundis sum KÍF sær út til at hava samlað ein hóp av leikarum, sum tykjast kunna spæla upp ímóti stóru feløgunum í landinum.

### Kári skal føra liðið upp í toppin

Undan hesum kappingarárinum var greitt, at venjarin í frá í fjør, Vagnur Johannesen, ikki fór at halda fram sum venjari hjá KÍF. Felagið úr Kollafirði mátti tí út at finna nýggjan venjara. Teir gjørdu skjótt av. Stutt eftir farna kappingarár prátaðu teir við fyrrverandi neistamannin, Kára Mortensen, og hann játtaði at taka sær av besta mansliðnum hjá KÍF.

Tá vit spurdu Kára, hvat hann væntaði av sínum monnum hetta kappingarárið, var Kári eitt sindur bersøgin: “Enn eru nógvir mans, sum ikki eru byrjaðir at venja, og tískil er ringt hjá mær at meta um, hvussu tað fer at ganga. Eg vóni at kappingarárið hjá okkum fer at vera gott, men av tí at eg kenni so lítið til hópin, so er ringt hjá mær at úttala meg. Men hópurin sær spennandi út, og um allir leikararnir koma at venja, so sær heilt væl út.”

### Fleiri leikarar ikki byrjaðir enn

Sjálvt um liðið hjá KÍF sær sterkt út, so er ein trupulleiki, at fleiri av leikarunum ikki eru byrjaðir at venja enn. Nakrir av føstu fúsunum hava verið upptiknir av arbeiði, meðan brøðurnir Gert og Arnbjørn Hansen, sum hava verið týdningarmiklir partar av liðnum hjá kollfirðingum síðstu árini, eru upptiknir av fótbólti. Harafturat er verjuálitið, Rógvi Weihe, burturstaddur í lestrarørindum, og sjálvt um hann verður heima aftur til kappingarbyrjan, so hevur hann als ikki verið við í venjingunum undan kappingini.

Kári Mortensen sigur eisini, at hetta er ein stórur trupulleiki fyri liðið, men eisini fyri hann sum venjara. “Tað er altíð keðiligt, tá ein ikki sleppur at arbeiði við tí væntaða hópinum, fyrrenn beint upp undir kappingarbyrjan. Okkara verju- og álopsvenjing er ikki nøktandi, tá fleiri av stuðulsleikarunum mangla, so hetta mugu vit gera nakað við, tá allir leikararnir vera tøkir til venjingar, heldur Kári.

### Útlendingar styrkja um

Í nøkur ár hava kollfirðingar roynt seg við útlendskum styrki á liðnum. Úrslitini hava verið misjøvn. Okkurt árið hevur gingið væl, meðan tað til tíðir hevur gingið minni væl. Í ár hava teir aftur fleiri útlendingar á liðnum, heili fýra í tali, og hesir styrkja uttan iva nógv um liðið.

Hesum er Kári Mortensen eisini samdur í, og hann sigur, at teir fýra hava víst góðan vilja undir venjingum higartil í ár. Hann sigur, at báðir serbarnir, Mirko Milinkovic og Damir Oros, hava spælt ómetaliga væl undir venjing, og at nýggi málverjin, Zeljco Iotic, sum er komin úr Neistanum, er fallin væl til. Síðsti útlendingurin, rumenin Daniel Rapa, hevur verið skaddur í eina tíð, men vit skilja á Kára, at hann fer at vera ein týðandi partur av KÍF liðnum í vetur. Kári sigur, at hesir leikararnir skulu taka ábyrgd í ár, og at teir skulu vísa ungu leikarunum vegin.

### Nú skal tað vera

Sum áður nevnt, so hevur KÍF verið við til at mynda botnin í føroyskum hondbólti síðstu árini. Seinastu tvey ella trý árini hava úrslitini tó verið á eini heilt góðari leið, og hetta er tað, sum fólk í Kollafirði byggja teirra vónir á til komandi kappingarár.

Úrslitini hjá kollfirðingum seinastu árini hava verið ov óstøðug, og hetta er grundin til, at teir ikki hava gjørt seg galdandi, har tað er stuttligt. Um teir klára at fáa meir støðug úrslit, so er ikki óhugsandi, at hetta er árið, har teir kunnu blanda seg í oddin.

Kollfirðingar hava altíð verið kendir fyri sín stríðsvilja, og um hesin verður tann sami í ár, sum hann hevur verið so mangan áður, so er ein møguleiki fyri, at teir kunnu gera ein óvæntaðan vørr í ár. Við nýggjum venjara, nýggjari høll og nógvum góðum fólki skuldi hetta ikki verið ógjørligt, so nú er bert upp til kollfirðingar sjálvar at vísa, at tíðin er búgvin til at teir blanda seg í oddastríðið í føroyskum hondbólti.

## Brøðurnir spæla alt árið

Brøðurnir Gert og Arnbjørn Hansen hava nú í fleiri ár verið við til at manna besta liðið hjá kollfirðingum. Aftur í ár verður roknað við, at teir báðir vera týðandi partar av liðnum. Umframt at leika hondbólt á besta liðnum hjá KÍF spæla teir báðir eisini fótbólt á formulaliðnum hjá EB/Streymi, sum í løtuni liggur á odda í Formuladeildini. So teir báðir hava úr at gera alt árið.

Sjálvt um fótbólturin kanska er teirra fyrsta val, so kann sigast, at eldri bróðurin Gert Hansen, sum er strikuspælari, hevur verið við á føroyska manslandsliðnum í hondbólti. Yngri bróðurin, Arnbjørn, hevur eisini stak góð hondbóltsevni, og spennandi verður at fylgja teimum báðum brøðrunum komandi kappingarár.

